

# Sjálvsavgerðarrætturin er útholaður

**- Tað er eftir míni meting rættiliga synd, at føroyska politiska skipanin í so langa tíð hevur hildið seg undan tí, tað veruliga sn‡r seg um - politikk - og heldur vavt seg inn í ógreiða hugtakið sjálvsavgerðarrættur, sigur Bárður Larsen, løgfrøðingur**

ST-FRÁBOÐAN
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

- Fráboðanin til ST loyvir ikki Føroyum einsíðugt at stíga úr ríkisfelagsskapinum, um føroyingar ynskja tað. Tað er tí ikki rætt, tá løgmaður óbeinleiðis sigur, at vit nú kunnu loysa frá Danmark bert um viljin og árræði er til tað í Føroyum. Í fráboðanini til ST ber ikki til at skilja millum, um talan er um sjálvsavgerðarrætt inneftir ella úteftir, og hetta er rættiliga avgerandi.

Løgfrøðingurin og limurin í Stjórnarskipan Føroya, Bárður Larsen, er ikki samdur í fatani hjá løgmanni av fráboðanini til ST. Løgfrøðingurin vísir á, at hugtakið um sjálvsavgerðarrætt er fløkjaligt, og tað er torført siga, hvønn týdning løgfrøðiligan hugtakið hevur longur.

- Fyrst er týdningarmikið at vera varður við, at fráboðanin til ST (CIRCULAR NOTE) við orðunum "They (uttanríkisheimildarlógirnar red.) are in conformity with the right to self-determination of the People of the Faroes and the People of Greenland under international law" ikki fráboðar nakran sjálvsavgerðarrætt, men at hon heldur forútsetir ein longu verandi sjálvsavgerðarrætt. Spurningurin er síðan, hvussu hesin longu verandi sjálvsavgerðarrættur skal tulkast.

Bárður Larsen vísir á, at fólkarættarliga verður tosað um tann ytra og tann innara sjálvsavgerðarrættin.

- Tann ytri sjálvsavgerðarrætturin inniheldur m.a. rættin til at loysa frá einum móðurlandi uttan tess samtykki. Tað tykist vera hendan rættin, løgmaður sipar til, tá hann sigur, at sjálvstýrismálið nú við sjálvsavgerðarrættitinum eina er á føroyskum hondum. Men hetta er ikki rætt. Ytri sjálvsavgerðarrætturin og við honum rætturin til loysing hevur ongantíð verið ætlaður - ella praktiseraður - øðrum enn 1. kolonium og landøkjum, ið ST hevur viðurkent sum ikki-sjálvstýrandi og 2. kúgaðum fólkum. Henda tulking er heilt mainstream í altjóða teori og m.a. stuðlað av so viðurkendum úttalilsum sum tí hjá kanadiska hægstarætti í 1998. Føroyar eru ikki eitt "ikki-sjálvstýrandi", og vit vera ikki illa kúgað av dønum. Tískil hava vit eftir altjóðarætti einans innara rættin til sjálvræði, og hann kunnu danir uttan víðari siga, at vit longu hava við hemastýrisskipanini og verandi fólkatingsumboðan; á henda hátt fara teir ivaleyst eisini at tulka "the right to self-determination of the People of the Faroes", um tað kemur til skarpskeringar.

- Tað er eftir míni meting rættiliga synd, at føroyska politiska skipanin í so langa tíð hevur hildið seg undan tí, tað veruliga snýr seg um - politikk - og heldur vavt seg inn í ógreiða hugtakið sjálvsavgerðarrættur. At føroyingar hava eitt legitimt krav uppá loysing, um meiriluti verður fyri tí, tað eru helst flestu føroyingar samdir um. Men slík argument hava bara meira við politiskan moral at gera enn fólkarættarligan sjálvsavgerðarrætt.

Spurdur um talan er um taktiskt snildni frá dønum at fráboða uttanríkispolitisku lógina til ST, svarar Bárður Larsen: Tað rokni eg við, tí sjálvsavgerðarrætturin er so óbestemmiligur, at hann er kærkomið amboð til at tiltoka eitt annars greitt politiskt landslag.

Í kjalarvørrinum av donsku fráboðanini til ST hevur kjak tikið seg upp um tí føroysku og donsku útgávuna av heimildarlógini. Bæði politikarar og løgfrøðingar hava áður víst á, at tað er óheppið, at viðmerkingarnar ikki eru tær somu.

Tað er fínt, at føroyingar halda uppá sína fatan, at vit hava valdið frá okkum sjálvum og ikki frá dønum ella altjóða samfelagnum. Spurningurinm er bara, hvat virði hetta hevur, tá danir kunnu fráboða altjóða samfelagnum ein heilt annan veruleika. Ella við øðrum orðum: Ber tað til at hava ein samleika uttan mun til, hvat onnur halda um ein?

### Rúkandi ósamdir

Kjaksendingini í Kringvarpi Føroya týskvøldið vísti enn einaferð, hvussu rúkandi ósamdir løgmaður og formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, eru í sjálvsstýrismálinum. Í gjárkvøldið var fráboðanin av heimildarlógini til ST á breddanum, og kjakið vísti enn einaferð, at samgongan og størsti andstøðuflokkurin dregur alt annað enn somu línu í sjálvsstýrismálinum.

Løgmaður vil vera við, at fráboðanin til ST staðfestir sjálvsgerðarrætt Føroya í altjóða samfelagnum og hetta hevur við sær, at "sjálvsstýrismálið nú er okkara burturav", sum hann málbar seg undir nýggjársrøðuni.

Løgmaður vísir á, at Føroyar hava nú fingið staðfest rættin hjá føroyska fólkinum í altjóða rætti, og hava føroyingar árræði og vilja at fara út úr ríkisfelagsskapinum, ber ikki til hjá dønum at sýta fyri tí, eftir at sjálvsavgerðarrætturin er staðfestur sambært altjóða rætti. Hetta kemur av, at altjóða rætturin er omanfyri statsrættin, sum danir vanliga hava hildið fast um.

Høgni Hoydal kallar hinvegin fráboðanin til ST sum størsta álopið á fullveldisrørsluna í nýggjari tíð. Hann vil vera við, at Føroyar endaliga hava góðtikið, at vit eru " Kongeriget Danmark for så vidt angår Færøerne"- at Føroyar bert eru húskallar og fulltrúar hjá Danmark. Formaður Tjóðveldisfloksins vísir á í lesarabrævið í dag, at ST-fráboðanin hevur við sær, at Føroyar ikki kunnu gera avtalur við onnur lond, um tað gongur ímóti donskum áhugamálum og at Danmark hevur evsta valdið yvir øllum føroyskum viðurskiftum við umheimin.

# Sigur fyri sambandsfólk



*- Eftir mínum tykki gevur tað onga meining at halda eina fólkaatkvøðu um hatta málið, tí føroya fólk hevur valt politikarar til at røkja teirra áhugamál, og tað er tað, landsstýrið og samgongan ger í løtuni, sigur Johan Dahl*

*Savnsmynd*

**-Satt at siga leggi eg ikki stórvegis um tað eru tær donsku ella føroysku viðmerkingarnar, sum eru sendar til ST. Fyri meg er hatta meira tekniskt lógarprát enn nakað annað, sigur formaðurin í uttanlandsnevndini, Johan Dahl**

ST-FRÁBOÐAN
*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

- ST-fráboðanin er ein sigur fyri sambandsfólk.

Sambandstingmaðurin og formaðurin í uttanlandsnevndini, Johan Dahl, fegnast um, at sjálvsavgerðarrættur føroyinga nú er staðfestur í ST.

- Fráboðanin er ein staðfesting av tí, sum Sambandsflokkurin hevur ført fram í meir enn eina øld. Vit hava altíð ført fram, at føroyingar hava sjálvsavgerðarrætt og hava kunnað tikið avgerð um okkara egnu framtíð. Hjá teimum, sum hava ivast í hesum, má fráboðanin til kennast væl, tí nú er sjálvsavgerðarrætturin staðfestur og fráboðaður altjóða samfelagnum, vísir Johan Dahl á.

Í kjalarvørrinum á fráboðanin hjá donsku stjórnini hevur kjak aftur tikið seg upp um føroysku og donsku útgávuna av heimildarlógini. Bæði politikarar og løgfrøðingar vístu undir viðgerðini av heimildarlógini í fjør, at tað var óheppið, at donsku og føroysku viðmerkingarnar ikki vóru tær somu.

Tá danska stjórnin stutt fyri jól boðaði ST frá heimildarlógini, vóru donsku viðmerkingarnar lagdar við- og ikki tær føroysku. Hetta tykist ikki at elva til høvuðbrýggj hjá formanninum í uttanlandsnevndini.

- Satt at siga leggi eg ikki stórvegis um tað eru tær donsku ella føroysku viðmerkingarnar, sum eru sendar til ST. Fyri meg er hatta meira tekniskt lógarprát enn nakað annað, tí tað týdningarmesta í øllum hesum er, at okkara sjálvsavgerðarrættur nú er fráboðaður altjóða samfelagnum, sigur Johan Dahl.

Í kjaksendingini í Kringvarpi Føroya týskvøldi bjóðaði formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, løgmanni av til eina fólkaatkvøðu, har Føroya fólk fekk møguleika at siga sína hugsan um fráboðanina til ST. Hesum vísir formaðurin í uttanlandsnevndini aftur.

- Eftir mínum tykki gevur tað onga meining at halda eina fólkaatkvøðu um hatta málið, tí føroya fólk hevur valt politikarar til at røkja teirra áhugamál, og tað er tað, landsstýrið og samgongan ger í løtuni, sigur Johan Dahl.